**SP-SOS SAMPLARI TIL SØLU**
1 ára gamal, ideel til live-performance. Nýprísur: 6.750 kr. Nú fyri: 4.800 kr.
*Tlf. 260830*

**TIL SØLU**
Midi keyboard til sølu fyri 1.000 kr. Lítið brúkt.
*Tlf. 260830*

**PIONEER FORSTERKARI**
ynskist bíliga til keyps. Hevur onki at siga hvussu stórur hann er – 2 ella 4 kanal.
*Tlf. 251439*

**BRÚKT LUMATRON**
minianlegg til sølu fyri 800 kr. Nýprísur 1500 kr.
*Tlf. 510153*

**TIL SØLU**
Luxman rør forsterkari. Sony Minidisk. Sony cd.ES.. KENWOOD EKOULAISARI. Yamaha bandspælari. Nýprísur í 1994 var 27.000 kr., til sølu nú fyri einans 8.500 kr. við ca. 10 minidiskum. Ljóðar sera gott fyri prísin. E-mail: bjarni93@hotmail.com
*Tlf. 314473 Rói*

## Út- & Sjónvarp

**SONY BILRADIO**
við CD-changer pláss fyri 10 fløgum. Til sølu fyri 1.000,-
*Tlf. 310068*

## Ymiskt

**MÁLNINGAR**
eftir Mikines, J. av Reyni, Eyðun av Reyni, Steffan Danielsen og Frimod Joensen o.a.
*Tlf. 213245*

**TIL SØLU**
10 stk. gamlir radiatorar, 1 stk. úthurð, 1 stk. wc-kumma.
*Tlf. 328138 eftir kl. 17*

**HEY**
Hava tit klæðir, bøkur ella onnur brúksting, ið tit vilja sleppa av við, vilja vit fegin avheinta tað. Í Havn tlf. 267704. Í Vágunum tlf. 255669.
*02.b*

**STJERNE FOR EN AFTEN**
Atgongumerki til konsertina í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 10. mai til sølu fyri 125 krónur. (vanligur prísur 195,- kr.)
*Tlf. 219994*

**TIL SØLU**
Skúrur til sølu um hóskandi boð fæst. Klæddur við jarnplátum og nýtjøraður.
*Tlf 218011 ella 757322*

**FERÐASEÐIL TIL SØLU**
Apex ferðaseðil við AA til Keypmannahavnar til sølu við avsláttri.
*Tlf. 421109*

**URTAGARÐSMOLD**
Góð urtagarðsmold fæst við at ringja
*Tlf. 218328*

**TIL SØLU**
Eitt 128 l. akvarium til sølu, alt uttan fiskar fylgja við.
*Tlf. 211532 eftir kl. 17*

**NOKIA 6510**
Sera hent telefon. Hevur m.a. FM Radio, til sølu fyri 1.400 kr.
*Tlf. 213067*

**PLAST VINDEYGU OG HURÐAR**
Vit selja plast vindeygu og hurðar í øllum støddum. Týskt framleidd, ið lúka øll ásett krøv. Ring, meyla ella faxa og fá eitt tilboð.
*ImpaX, impax@impax.fo, Tlf. 318700/228700 Fax. 318*

**ERICSSON T66**
fartelefon lítið brúkt, vigar einans 59 g. til sølu fyri 1200.- kr.
*Tlf. 504840*

**VIÐ »SØKONGEN«**
til føroysku útróðrarplássini í Grønlandi – 2 pláss eru eftir til áhugaverda túrin 24. juni og 8. juli. Tlf. 371972 ella 254752.
*weymyr@post.olivant.fo, w*

**TIL SØLU**
Ein Apex ferðaseðil Vágar-Keypmannahavn til sølu fyri 2.800,- kr.
*Tlf. 443308*

**DIVERSE**
brugte elradiatorer til salg. Ring og hør nærmere.
*Tlf. 421719/222134*

**KAVARAÚTGERÐ TIL SØLU**
2 komplett sett, stødd medium og x-large, til sølu fyri 10.000 kr. fyri hvørt setti.
*Tlf. 219102*

**MYNDATÓL TIL SØLU**
1 1/2 ára gamal Minolta Dynax 500si kassi til sølu fyri 1.800 kr. 1 ára gamalt Minolta 3500 xi blitz til sølu fyri 1.500 kr. 1 ára gomul Tamron 28-300 mm. aspherisk linsa. til sølu fyri 5.000 kr. Samlað til sølu fyri einans 7.500 kr., nýprísur 13.000 kr.
*Tlf. 260590*

**TIL SØLU**
Gamo Hunter 220 luftbyrsa 5,5 mm til sølu fyri 1800,-. 18 ára aldursmark.
*Tlf. 222615*

**NOKIA**
4 mðr. gomul Nokia 3410 fartelefon til sølu fyri einans 1.000 kr.
*Tlf. 259173*

**NOKIA 3330**
til sølu fyri 900,-
*Tlf. 224944 ella 312077*

**XP VATNSKUTARI**
130 HK, nýggjur motorur, siglt 32 tímar. Vognur, 4 dragtik, vatnski, púta fylgir við. Prísin kunnu vit tosa um.
*Tlf. 226880*

**SÚRHOYGGJ**
til sølu, umleið 3,5 kbm.
*Tlf. 441446 ella 260338*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Um hóskandi boð fæst, er ein málningur ið Frimod Joensen hevur málað til sølu – par í mánalýsi.
*Tlf. 504113*





www.sosialurin.fo


# HEILSANIR



**Góða mamma**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á tínum runda degi í dag.
**Heilsan sjeikarnir**



**Góði Julian**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja didda, mamma og babba**



**Góða Petra**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum tann 28. apr.
**Heilsan omma og abbi í Hósvík**



**Góða Bára**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 19 ára føðingar-degnum. Jesus pápi signi teg. Ja, her hert tú ordiliga cool, ha?
**Heilsan mamma og pabba**



**Góða Petra**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum tann 28. apr.
**Heilsan mostrarnar í Hósvík**



**Hey góða**
Tillukku við 40 ára degnum í dag, og nógv góð ár í framtíðini.
**Babba**



**Góða mostir og fastir**
Tillukku á føðingardegnum 29. apr.
**Heilsan Jensa, Alma, Frank og Páll**



**Elskaða Bjørk**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 29. apr. Muss og klemm frá
**Mammu og babba**



**Góða allarbesta langomma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum tann 27. apr. Vit elska teg.
**Bestu heilsanir Edna og Sámal Jákup**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..............................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# Útlit fyri formansskifti í Smyril Line

AÐALFUNDUR
*Ingi Rasmussen*

Í dag, týsdagin 29. apríl klokkan 16, hevur Smyril Line aðalfund.

Vælvitandi keldur vilja vera við, at formaðurin í nevndini, Tórmóður Djurhuus, á hesum fundi fer at takka fyri seg og taka seg aftur sum nevndarformaður fyri Smyril Line.

Sjálvur vil hann ikki vátta tíðindini, men sigur bara, at tað fáa vit at síggja, tá aðalfundurin er.

Hvussu verður og ikki. Tórmóður Djurhuus umboðar partapeningin hjá Framtaksgrunninum í Smyril Line, og leggur hann frá sær, stendur ein týdningarmikil stólur í stóru verkætlanini, sum nýggja Norrøna er, tómur at manna.



*Stóra takið hjá Tórmóði Djurhuus sum formanni í Smyril Line hevur verið nýggja Norrøna*

Listastevna Føroya 2003

# Yrkingakapping

TÍÐINDASKRIV

Seinasta heyst bjóðaði Listastevna Føroya til kapping at skriva nýggjar, føroyskar yrkingar til Listastevnu Føroya 2003.

Yrkingarnar, sum verða virðisløntar við 5.000 kr. fyri hvørja av teimum 10 bestu, verða lisnar upp í Útvarpi Føroya allar dagarnar á Listastevnuni – ein yrking um dagin, meðan Listastevnan stendur 7. – 17. august 2003.

Til at velja út bestu yrkingarnar er ein dómsnevnd sett: Høgni Djurhuus, tíðindamaður, Bergljót av Skarði, studentaskúlalærari og Kim Simonsen, cand. phil. í norðurlendskum bókmentum.

1. mai er seinasta freist at lata inn yrkingar til kappingina. Listastevnan hevur tó longu móttikið hópin av yrkingum, síðani kappingin varð útskrivað í heyst.

Listastevnan hevur á hvørjum ári skrivað út bókmentunarligar kappingar:

Til fyrstu Listastevnuna í 2001 varð bjóðað til kapping at skriva stuttsøgur.

Tríggjar virðislønir vórðu tá latnar:

Fyrsta virðislønin áljóðandi 20.000kr. fór til Hanus Kamban fyri søguna "Angels Place", onnur virðislønin áljóðandi 15.000 kr. til Marjun Kjelnæs fyri søguna "Kópakona" og triðju virðislønina áljóðandi 10.000 kr. fekk Niclas Rasmussen fyri søguna "Fyri lív, eftir deyða". Vinnandi søgurnar og fjúrtan av søgunum, sum komu inn, vórðu givnar út í bók "Mjørki í heilum", sum Bókadeild Føroya Lærarafelags stóð fyri. Vinnandi stuttsøgurnar og fimm aðrar vóru harafturat at hoyra í Útvarpi Føroya.

Til aðru Listastevnuna í 2002 varð bjóðað til kapping at skriva handrit til útvarpsleik.

Ein virðisløn áljóðandi 50.000 kr. varð latin fyri besta handritið. Virðislønina fekk Marjun Kjelnæs fyri handritið til útvarpsleikin "Trongd", sum Útvarp Føroya sendi tá Listastevna Føroya 2002 varð sett. Eyðun Johannesen legði útvarpsleikin til rættis og fyri teknikkinum stóð Súni Selfoss.

Til Listastevnu Føroya 2004 er eisini útskrivað bókmentunarlig kapping. Í hesum føri snýr tað seg um at skriva skaldsøgu. Vinningurin í hesum føri er 150.000 kr og freistin at skriva til hesa kapping er sett til 1. mai næsta ár.










Hjá Føroya Sparikassa hava allir brikkar týdning. Stórir sum smáir. Nú sóknast vit eftir nýggjum týðandi brikkum soleiðis, at putlispæl okkara skal ganga upp.

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit vænta, at tú ert lívlig/ur og óhátíðarlig/ur. Tú ert ein eldhugaður bólkaspælari og kennir, at sjálvsábyrgd og góð tillagingarevni skapa íblástur.

Vit vilja skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast. Vit leggja serstakliga dent á opið og ærligt prát. Tað er við til at menna felags hugburð millum starvsfólk og kundar.

Við útbúgving úr Føroya Sparikassa fært tú eisini førleika til at starvast innan aðrar vinnur. Ella tú brúkar útbúgvingina sum lopfjøl til víðari útbúgving. Tó stremba vit sjálvandi eftir, at tú framhaldandi vilt vera á okkara liði, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Sparikassin hevur eisini fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

Í næmingatíðini ert tú við í prógvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Starvsfólkadeildina, tlf. 348510.

Send umsóknina við avriti av próvskjølum til adressuna niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. mai 2003 kl. 18.00.

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

www.sparikassin.fo
E-mail: starvsfolkadeildin@sparikasssin.fo

FØROYA SPARIKASSI